# Døpur útlit hjá Jákupi

**Eddie Gustafsson hevur higartil verið stinnasti málverjin í tippeliguni, og er ein týðandi orsøk til góðu støðuna hjá Molde**

NOREG
*Jákup Mørk*

Tað gongur strúkandi hjá Molde í bestu norsku deildini. Sunnudagin høvdu teir vitjan av Vålarenga, og eftir at støðan í hálvleikinujm hevði verið 0-0, eydnaðist heimaliðnum í seinna hálvleiki at leggja somikið av trýsti á, at endaliga úrslitið gjørdist ein 2-0 sigur.

Sigurin merkti, at Molde framvegis hevur eitt gott tak í norska fótbóltsoddinum, har tað í løtuni bert er Lynd, sum stendur seg betri.

Ein av orsøkunum til at tað hevur gingist so væl hjá Molde, er nýggi svenski málverjin, Eddie Gustafsson. Hann kom til felagið í summarsteðginum, og eftir venjingarleguna í Spania undan kappingini varð gjørt av, at tað skuldi verða hann, sum gjørdist fyrsta valið millum stengurnar.

Jákup Mikkelsen segði tá, at hjá sær var ikki annað at gera enn at brynja seg við tolið, og líkt er til, at tolið skal vera sera gott.

Higartil hevur Eddie Gustafsson nevnliga verið stinnasti málverjin í norsku deildini, og so leingi hetta stendur við, er neyvan nøkur orsøk hjá venjaranum at gera nakað skifti á plássinum.



*Føroyski landsliðsmálverjin má lata sær lynda at sita á beinkinum í Molde, og við spælinum sum fyrsti málverjin sýnir, tykist hetta eisini at verða støðan framyvir*

# So er Henrik leysur

**Østykke tryggjaði sær um vikuskiftið uppflyting, so nú hava Føroyar aftur ein landsliðsvenjara í fótbólti**




*So er tað ordiliga greitt. Henrik Larsen tekur nú við sum føroyskur landsliðsvenjari*

DANMARK
*Jákup Mørk*

Um vikuskiftið gjørdist greitt, hvørjir tveir av teimum trimum uppflytarunum til donsku 1. deild verða.

Oddaliði í deildini, Skjold, vann leygardagin sín dyst, og staðfesti harvið, at teir í øllum førum gerast nummar trý í deildini, og sunnudagin gjørdi Ølstykke teimum kynstrið eftir, tá teir vunnu útidystin móti Glostrup 2-1, samstundis sum Holstebro á fjórða plássi spældi javnleik.

Úrsltini innibera, at Ølstykke nú hevur 10 stig fleiri enn Holstebro, og við trimum dystum eftir at spæla eru teir sostatt vísir í uppflytingini.

**Henrik leysur**

Einki er at siga til, um føroysku fótbóltsbossarnir vóru fegnir, tá teir frættu um úrslitið.

Vissan um uppflyting ber nevniliga við sær, at Henrik Larsen nú letur Benny Johansen fáa ábyrgdina av liðnum hjá Ølstykke, og at Henrik sostatt kann fara at hugsa um føroyska landsliðið.

Sáttmálin, sum Henrik og FSF gjørdu herfyri tók annars ikki við fyrr enn 1. juli, men partarnir høvdu tó avrátt, at um Ølstykke vissaði sær uppflyting áðrenn seinasta leikda, so hevði venjaranum frítt at fara.

Fyrsta uppgávan hjá nýggja venjaranum verður longu í august mánaði, og tí er einki at siga til, um hann fegin vil síggja nøkur umfør av føroysku kappingini undan steðginum, so hann kann meta um, hvørjar leikarar hann skal gera nýtslu av.

# Óli á blettinum

**Óli Johannesen skoraði, men Hvidovre tapti, tá teir sunnudagin vitjaðu Johan Byrial Hansen og Fredericia**

DANMARK
*Jákup Mørk*



*Óli Johannesen var á blettinum, men hetta rakk ikki til stig móti Johan Byrial Hansen og liðfeløgunum úr Fredericia, tá føroyingauppgerð var donsku 1. deild*

Talan var um føroyingauppgerð í næst bestu donsku deildini, tá Johan Byrial Hansen og Fredericia tóku ímóti Óla Johannesen og Hvidovre sunnudagin.

Bæði liðini høvdu stig fyri neyðini í royndunum at vinna seg undan niðurflytingarvandanum, og tað eydnaðist hjá Johan og teimum at fáa hesi til høldar.

Endaliga úrslitið gjørdist 2-1 til Fredericia eftir at teir í hálvleikinum høvdu verið á odda 1-0. Stutt eftir hálvleik varð leiðslan økt upp í tvey mál, men alt fyri eitt svaraði Óli Johannesen aftur, soleiðis at spenningurin varð varðveittur allan dystin á tamb. Meira enn tað sama gjørdist tað tó ikki til, og við teimum trimum stigunum vann Fredericia seg upp um niðurflytingarstrikuna. Hvidovre er tó framvegis fimm stig oman fyri strikuna, men við trimum dystum eftir at spæla kunnu teir enn ikki kenna seg heilt tryggar.

Triðja liðið við føroyskum íkasti, Randers Freja, helt sanna málveitslu, tá Herfølge kom á vitjan. Endaliga úrslitið gjørdist 4-4, og framdi Herfølge leikarin, Rajko Lekic tað bragd at skjóta øll fýra málini hjá gestunum. Atli Gregersen var ikki á liðnum hjá Randers Freja.

## Danska 1. deild

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Farum | 27 | 19 - 6 - 2 | 62 | 31 | 31 | 63 |
| 2 | Køge | 27 | 19 - 3 - 5 | 52 | 28 | 24 | 60 |
| 3 | HFK Sønderj. | 27 | 16 - 3 - 8 | 55 | 44 | 11 | 51 |
| 4 | Frem | 27 | 13 - 9 - 5 | 50 | 33 | 17 | 48 |
| 5 | Herfølge | 27 | 13 - 8 - 6 | 48 | 35 | 13 | 47 |
| 6 | Randers F. | 27 | 12 - 6 - 9 | 54 | 35 | 19 | 42 |
| 7 | B 1913 | 27 | 11 - 9 - 7 | 39 | 37 | 2 | 42 |
| 8 | AC Horsens | 27 | 10 - 8 - 9 | 35 | 29 | 6 | 38 |
| 9 | FC Aarhus | 27 | 9 - 8 - 10 | 35 | 39 | -4 | 35 |
| 10 | Hvidovre | 27 | 7 - 8 - 12 | 40 | 46 | -6 | 29 |
| 11 | B 1909 | 27 | 8 - 5 - 14 | 45 | 62 | -17 | 29 |
| 12 | Fredericia | 27 | 6 - 8 - 13 | 37 | 39 | -2 | 26 |
| 13 | Kolding FC | 27 | 6 - 6 - 15 | 41 | 57 | -16 | 24 |
| 14 | Brønshøj | 27 | 6 - 6 - 15 | 38 | 59 | -21 | 24 |
| 15 | B93 | 27 | 6 - 6 - 15 | 34 | 55 | -21 | 24 |
| 16 | Skive | 27 | 3 - 5 - 19 | 32 | 68 | -36 | 14 |

*Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers F.), Óli Johannesen (Hvidovre), Johan Byrial Hansen (Fredericia)*

## Norska tippeligan

| | | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Lyn | 10 | 8 - 0 - 2 | 16 | 13 | 3 | 24 |
| 2 | Molde | 10 | 6 - 2 - 2 | 20 | 8 | 12 | 20 |
| 3 | Odd. Grenl. | 10 | 6 - 1 - 3 | 17 | 11 | 6 | 19 |
| 4 | Viking | 10 | 5 - 3 - 2 | 20 | 12 | 8 | 18 |
| 5 | Stabæk | 10 | 5 - 3 - 2 | 19 | 12 | 7 | 18 |
| 6 | Rosenborg (M) | 10 | 5 - 2 - 3 | 20 | 13 | 7 | 17 |
| 7 | Bodø/Glimt | 10 | 4 - 2 - 4 | 16 | 12 | 4 | 14 |
| 8 | Våleranga | 10 | 3 - 4 - 3 | 12 | 10 | 2 | 13 |
| 9 | Lillestrøm | 10 | 3 - 4 - 3 | 9 | 8 | 1 | 13 |
| 10 | Brann | 10 | 3 - 1 - 6 | 13 | 21 | -8 | 10 |
| 11 | Bryne | 10 | 2 - 2 - 6 | 9 | 18 | -9 | 8 |
| 12 | Start | 10 | 1 - 4 - 5 | 8 | 17 | -9 | 7 |
| 13 | Moss | 13 | 1 - 4 - 8 | 9 | 20 | -11 | 7 |
| 14 | Sogndal | 10 | 1 - 2 - 7 | 10 | 23 | -13 | 5 |

*Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)*



Búskapur og vinna:

## Statoil aftur til verka

Norska oljufelagið Statoil fer sum skjótast at taka arbeiðið við teirri sonevndu Snøhvit-verkætlanini í Norðurnoregi uppaftur, eftir at eftirlitsmyndugleikarnir hjá EFTA hava góðkent tær serligu skattareglurnar, sum skulu galda fyri verkætlanina. Upprunaliga ætlaði stjórnin, at norski staturin skuldi veita verkætlanini stuðul, men tað vildi EFTA ikki góðtaka. Tí komu nakrar serligar skattareglur ístaðin.

Statoil hevur bíðað við verkætlanini, meðan EFTA hevur kannað málið, og nú avgerðin er tikin, fer felagið sum skjótast aftur til verka, sigur kunningarstjórin í Statoil, Kristofer Hetland. Norski umhvørvisverndarfelagsskapurin Bellona hevur boðað frá, at hann fer at kæra avgerðina hjá EFTA fyri tann serliga EFTA-dómstólin.

## Ómannaðar støðir

Alt fleiri og fleiri bensinstøðir í Danmark eru ómannaðar. Síðani 1998 er talið á mannaðum bensinstøðum minkað úr 1776 í 1355, men um somu tíð er talið á ómannaðum bensinstøðum vaksið úr 725 í 953. Í Svøríki er meiri enn helvtin av bensinstøðunum ómannaðar, og soleiðis verður eisini í Danmark um stutta tíð, siga oljufeløgini.

## Húsbankin ongar pengar

Norski Húsbankin er komin í neyð. Bankin hevur seinastu tíðina verið noyddur at havna umsóknum frá fólki, sum ætla at byggja ella at keypa sær hús, tí ov lítið av pengum er eftir í bankanum.

Leiðslan í Húsbankanum sigur, at hon hevur longu brúkt 60 prosent av teimum útlánspengunum, sum bankin kann læna í ár, og at neyðugt er við meiri enn trimum mia. krónum afturat, skal bankin nøkta eftirspurningin. Stjórnin hevur boðað frá, at bankin fær ikki meiri pengar í ár.

UTTAN ÚR HEIMI

# Eldur í Buckingham Palace



*Nógvir sløkkiliðsmenn komu til Buckingham Palace, og tað eydnaðist skjótt at sløkkja eldin.*

**Eingin fekk skaða, tá eldur kom í Buckingham Palace í London sunnukvøldið**

ELDSBRUNI
*Árni Joensen:*

Um sjeytíðina sunnukvøldið kom eldur í tann vestara partin av Buckingham Palace í London, har bretsku drotningahjúnini búgva. Elizabeth drotning og Philip prinsur vóru tó ikki stødd á slottinum.

Løgreglan í London boðaði alt fyri eitt sløkkiliðnum frá, at tólv væl útgjørdir sløkkibilar komu stutt eftir í slotstúnið. Tá var eldurin farin upp ígjøgnum takið, og fleiri sløkkiliðsmenn vórðu settir upp á takið at sløkkja. Tveir tímar seinni boðaði løgreglan frá, at sløkkiliðið hevði fingið tamarhald á eldinum.

Ein talskvinna hjá løgregluni segði, at eldurin kyknaði í einari íbúð. Talskvinnan segði, at skaðin var lítil, og at eingin av teimum nógvu skreytlutunum á slottinum fekk skaða. Tveir málningar vórðu kortini sendir til kanningar.

Løgreglan gjørdi av at flyta øll starvsfólkini av slottinum, tá eldurin kyknaði, og hetta var fyrstu ferð síðani týsku bumbuálopini undir seinna heimsbardaga, at fólk hava fingið boð um at fara úr Buckingham Palace.

Umframt starvsfólkini var ein hópur av tónleikarum í Buckingham Palace, tá eldurin kyknaði. Teir fyrireikaðu konsertina, sum var í gjárkvøldið í sambandi við, at Elizabert hevur verið drotning í 50 ár.

# CIA visti um tveir av yvirgangsmonnunum

**Amerikanska fregnartænastan CIA fekk kunnleika til tveir yvirgangsmenn í sambandi við ein fund, sum al-Qaeda helt í Malaysia í januar í 2000. Kortini fingu teir báðir menninir loyvi at koma aftur til USA at fyrireika atsóknirnar tann 11. september í fjør**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Meiri enn 20 mánaðir undan yvirgangsatsóknunum í USA tann 11. september í fjør visti amerikanska fregnartænastan CIA um yvirgangsmenninar Nawaf Alhazmi og Khalid Almihdbar. Teir báðir menninir vóru á fundinum hjá al-Qaeda í Malaysia, men fingu loyvi at koma aftur til USA. Tann 11. september í fjør stoyttu teir flogfar nummar 77 hjá American Airlines niður í verjumálaráðið Pentagon.

Amerikanska blaðið Newsweek skrivar, at CIA kunnaði ongantíð samveldisløgregluna FBI um teir báðar menninar. Hóast fregnartænastan visti, at teir høvdu samband við al-Qaeda hjá Osama bin Laden, sluppu teir at ferðast frítt í USA. Teir nýttu síni egnu nøvn í øllum samskifti við myndugleikar og bankar og sluppu at læra til flogskipara, uttan at CIA rørdi hond frá síðu.

CIA visti, at menn úr al-Qaeda skuldu halda fund í Malaysia í januar í 2000, og agentar hjá fregnartænastuni hildu eygað við fundarluttakarunum, uttan at hesir varnaðust tað. Malaysiska fregnartænastan helt eisini eygað við fundinum og tók fleiri myndir av monnunum.

Stutt eftir fundin varnaðist CIA, at Alhazmi var farin við flogfari til Los Angeles, og at Almidhbar hevði útvegað sær innferðarloyvi til USA. Seinni komu agentarnir eftir, at teir báðir menninir høvdu verið í sama flogfari til Los Angeles.

Men av einari ella aðrari orsøk gjørdi CIA einki burtur úr hesum kunnleikanum, og tí fingu teir báðir menninir frítt at fara í USA og at fáa sær tann neyðuga kunnleikan, so teir kundu stýra einum flogfari.

Tann 11. september í fjør vóru teir báðir umborð á American Airlines-flogfarinum, sum rendi seg niður í Pentagon.

Tríggjar vikur frammanundan hevði CIA ávarað um teir báðar al-Qaeda-menninar, men tá var ov seint.

Úr Norðurlondum:

## Granat í viðføri

Trygdareftirlitið í Kastrup-floghavnini í Keypmannahavn fann sunnukvøldið eina granat í einum kufferti. Tað vísti seg, at talan var um eina gamla granat frá seinna heimsbardaga. Maðurin, sum átti kuffertið, hevði keypt sær ferðaseðil til Brasilia. Hann starvast á kilsku sendistovuni í Keypmannahavn, men hví hann skuldi hava ta gomlu granatina við sær, hevur løgreglan ikki sagt nakað um enn.

## Liva longur

Ein kanning í Danmark vísir, at danir liva longur enn fyrr. Í mong ár hevur gongdin annars verið tann øvugta, men nú vísir tað seg, at seinastu fimm árini er meðallivialdurin í Danmark hækkaður munandi.

Síðani 1995 er meðallivialdurin hjá donskum monnum hækkaður 1,7 ár og er nú 74,3 ár. Í sama tíðarskeiði er meðallivialdurin hjá donsku kvinnunum hækkaður 1,2 ár, og í meðal liva danskar kvinnur nú í 79 ár.

Tey serkønu siga, at fólk roykja minni nú enn fyrr, samstundis sum tey gera meiri fyri at halda kroppin við líka. Betri læknaviðgerð er eisini ein frágreiðing.

## Minsti meirilutin

Danski Fólkaflokurin hevur havt stóra afturgongd í seinastuni, og flokkurin er nú minkaður so nógv, at hevði val verið í dag, hevði tann borgarligi meirilutin verið so lítil, sum hann yvirhøvur kann vera.

Ein nýggj veljarakanning vísir, at Danski Fólkaflokkurin hevði fingið níggju prosent av atkvøðunum, var fólkatingsval nú. Á valinum í november fekk flokkurin 12 prosent. Teir báðir stjórnarflokkarnir hava báðir lítla afturgongd, meðan allir andstøðuflokkarnir hava framgongd við undantak av Kristiliga Fólkaflokkinum. Úrslitið av einum vali nú hevði givið stjórnarflokkunum og Danska Fólkaflokkinum 90 tinglimir og andstøðuni 89.